Fíggjarmálaráðið

Dagfesting: 04. desember 2020
Mál nr.: 20/00374
Málsviðgjørt: AP

Fylgiskjal 1

Javntekstur

Galdandi orðingar í løgtingslógini samanbornar við broyttu orðingarnar í løgtingslógaruppskotinum.

Galdandi orðingar	**Løgtingslógaruppskotið**
	§ 1 Í løgtingslóg nr. 33 frá 19. mai 2008 um avgjøld við skráseting av motorakførum, sum broytt við løgtingslóg nr. 12 frá 26. februar 2010, løgtingslóg nr. 160 frá 20. desember 2013, løgtingslóg nr. 57 frá 18. mai 2015, løgtingslóg nr. 142 frá 18. desember 2015, løgtingslóg nr. 155 frá 12. desember 2018, løgtingslóg nr. 36 frá 9. apríl 2019, løgtingslóg nr. 66 frá 18. mai 2020, løgtingslóg nr. 91 frá 7. juni 2020 og løgtingslóg nr. 100 frá 25. juni 2020, verða gjørdar hesar broytingar:
§ 3. Fyri persónvognar verður goldið 50% í virðisavgjaldi av avgjaldsskylduga virðinum til og við 100.000 kr., og 75% verður goldið í virðisavgjaldi av avgjaldsskylduga virðinum oman fyri 100.000 kr.	**1.** Í § 3, stk. 1 verður "persónvognar" broytt til: "persónbilur".
§ 3. ...	**2.** Í § 3 verða sum stk. 2 og 3 sett: "*Stk. 2*. Persónbilar við hybrid tøkni ella plugin-hybrid tøkni, og sum verða skrásettir frá 1. januar 2021, skulu rinda 30% í virðisavgjaldi av

	avgjaldsskylduga virðinum til og við 100.000 kr. og 45% í virðisavgjaldi av avgjaldsskylduga virðinum oman fyri 100.000 kr. *Stk. 3.* Persónbilar, sum bara nýta ravmagn ella vetni til framdrift, og sum verða skrásettir frá 1. januar 2023 skulu rinda 30% í virðisavgjaldi av avgjaldsskylduga virðinum til og við 100.000 kr., og skulu rinda 45% í virðisavgjaldi av avgjaldsskylduga virðinum oman fyri 100.000 kr.”
§ 5. Fyri motorsúkklur við motorstødd yvir 50 cm^3 er virðisavgjaldið 35% av avgjaldsskylduga virðinum. Fyri motorsúkklur við motorstødd yvir 50 cm^3, ið hava verið endaliga skrásettar uttanlands, og eru yngri enn 5 ár, er virðisavgjaldið 35% av avgjaldsskylduga virðinum sbrt. § 6. Fyri motorsúkklur við motorstødd yvir 50 cm^3, ið hava verið endaliga skrásettar uttanlands, og eru 5 ár og eldri, er virðisavgjaldið 65% av avgjaldsskylduga virðinum sbrt. § 6.	**3.** § 5 verður orðað soleiðis: “**§ 5.** Fyri motorsúkklur við motorstødd yvir 50 cm^3 er virðisavgjaldið 35% av avgjaldsskylduga virðinum. *Stk. 2.* Ásetingarnar í stk. 1 eru eisini galdandi fyri innfluttar brúktar motorsúkklur, ið hava verið endaliga skrásettar uttanlands, við motorstødd yvir 50 cm^3.”
§ 6. Fyri motorakfar, ið hevur verið endaliga skrásett uttanlands í minni enn 5 ár, verður avgjaldsskylduga virðið niðurskrivað 10% árliga av upprunavirðinum á motorakfarinum, tá tað var spildurnýtt. *Stk. 2.* Fyri motorakfar, ið hevur verið endaliga skrásett í útlandi í 5 ár ella longri, er avgjaldsskylduga virðið 50% av upprunaliga virðinum á motorakfarinum, tá tað var spildurnýtt.	**4.** § 6 verður orðað soleiðis: “**§ 6.** Fyri motorakfar, sum hevur verið endaliga skrásett uttanlands, verður virðisavgjald rindað av avgjaldsskylduga virðinum, sbrt. § 3, stk. 1, sbr. § 2, stk. 2.”
§ 7. Undantikin virðisavgjaldi eru: 1) Hýru- og skúlaakfør. Fyri at skráseta motorakfar sum hýru- ella skúlavogn krevst loyvi frá Akstovuni. Verður hýru- ella skúlavognur skrásettur til privata nýtslu, áðrenn 30 mánaðir eru gingnir frá skrásetingini sum hýru- ella skúlavognur, verður virðisavgjaldið goldið sbrt. §§ 3-5. lutfalsliga samsvarandi tíðini, sum restar í teimum 30 mánaðunum. Verður hýru- ella skúlavognur seldur til sama vinnuliga endamál, skal keyparin hava loyvi frá Akstovuni. 2-8). ... *Stk. 2.* ...	**5.** Í § 7, stk. 1, nr. 1, 3. pkt. verður “30 mánaðir” broytt til: “20 mánaðir” og “30 mánaðum” broytt til: “20 mánaðum”.

§ 7. ... 1-7) ... 8) Motorakfør, sum bara nýta ravmagn ella vetni til framdrift, og sum eru skrásett í seinasta lagi 31. desember 2020. *Stk. 2*. ...	**6.** § 7, stk. 1, nr. 8 verður orðað soleiðis: "8) Motorakfør, sum bara nýta ravmagn ella vetni til framdrift, og sum verða skrásett frá 1. januar 2021 til og við 31. desember 2022."
	7. Í § 7, stk. 1 verður sum nr. 9 sett: "9) Innflutt brúkt motorakfar, sum er allýst sum flytigóðs í løgtingslóg um toll."
	8. Í § 9 verður sum nr. 5 sett: "5) Innflutt brúkt motorakfar, ið er allýst sum flytigóðs, sbrt. § 7, nr. 9."
§ 22. ... *Stk. 2*. Tann, ið letur eitt innflutt, brúkt motorakfar skráseta, bilasøla, innflytari ella eigari, hevur skyldu at útvega Akstovuni skjalprógv fyri upprunavirðinum upp á skrokknummar frá framleiðara ella einum av framleiðaranum góðkendum umboði. Upprunavirðið skal gerast upp, grundað á listaprís uttan avgjøld. *Stk. 3*. Akstovan kann í serligum føri gera eina meting av upprunavirðinum. *Stk. 4*. Akstovan kann ímóti gjaldi útvega skjalprógv samsvarandi stk. 1 og 2. Gjaldið er 3000 kr. *Stk. 5*. Landsstýrismaðurin kann í kunngerð áseta nærri reglur fyri skjølum og upplýsingum í stk. 1 og 2, sum skjalprógva upprunavirði sambært § 2 og § 6.	**9.** § 22, stk. 2-5 verða strikað.
	§ 2 *"Stk. 1*. Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd. *Stk. 2*. § 1, nr. 6 fer úr gildi 1. januar 2023."